**Fylgiskjal 1 til avtalu um neyðtilbúgving í sambandi við arbeiðssteðg:**

Fylgjandi verður lagt afturat, sum nýtt (stk. 5 ella 6) í avtaluni um fráboðanarform og fráboðanarfreis hjá ávikavist KAF og FMR:

> Partarnir eru samdir um, at ein arbeiðssteðgur í ongum førum má seta lív og heilsu borgarans í vanda.
> Partarnir eru samdir um, at møgulig undantøk eiga at verða viðgjørd í góðari tíð, áðrenn arbeiðssteðgur verður lýstur, og at arbeiðssteðgur í minst møguligan mun eigur at raka fólk, ið eru óhjálpin og sum hava tørv á neyðugari heilsurøkt fyri at klára seg.

Tá arbeiðssteðgur kann seta lív og heilsu í vanda, eiga nøkur starvsfólk tí at verða undantikin arbeiðssteðgi.

1. Leiðarar kunnu ikki fara í arbeiðssteðg.
2. Leiðslan ger av í samráð við álitisfólkið, hvussu nógvum starvsfólki tørvur er á, sbr. nr. 4 niðanfyri. Tá sáttmálin millum partarnar er uppsagdur lata stovnsleiðslur og kommunur ávikavíst Fíggjarmálaráðnum ella Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum fylgiskjal A, har ásett verður, hvørji starvsfólk verða undantikin møguligum arbeiðssteðgi. Fíggjarmálaráðið/Kommunala Arbeiðsgevarafelagið sendir skjølini víðari til Heilsurøktarafelagið, og í seinasta lagi 1 mánað innan sáttmálin gongur út, skal semja vera millum partarnar um fylgiskjal A.
3. Starvsfólk, ið eru undantikin arbeiðssteðgi, eiga bert at átaka sær tær neyðugu uppgávurnar. Endamálið er bert at forða fyri, at vandi ikki stendst fyri lívi og heilsu borgarans. Starvsfólk mugu sostatt ikki átaka sær aðrar uppgávur.
4. Viðkomandi limir hjá Heilsurøktarafelagnum, sum fáa arbeiðsboð frá leiðsluni, hava skyldu til at fara til arbeiðis beinanvegin og at fylgja sáttmálanum, sum var galdandi, áðrenn arbeiðssteðgurin var lýstur.
5. Er Heilsurøktarafelagið ikki samt við eini avgerð hjá leiðsluni sambært skjali A, kann felagið leggja málið fyri eina nevnd, sum ger av, um undantakið er neyðugt fyri at tryggja, at lív og heilsa borgarans ikki verða sett í vanda.
6. Nevndin verður mannað við trimum limum. Fíggjarmálaráðið/Kommunala Arbeiðsgevarafelagið velja ein lim, og Heilsurøktarafelagið velur ein lim. Hesir báðir limirnir velja síðani forfólkið. Forfólkið skal hava viðkomandi fakligt innlit og vera óheft.
7. Til limirnir hava valt eitt forfólk sambært nr. 6, er forfólkið útnevnt av sorinskrivarinum. Nevndin skal taka avgerð innan 24 tímar, eftir at áheitan sambært nr. 4 er komin frá Heilsurøktarafelagnum. Verður nevndin ikki samd, tekur forfólkið avgerð.
8. Sáttmálapartarnir bera útreiðslurnar av at samsýna hvør sínum limi í nevndini. Sáttmálapartarnir bera útreiðslurnar av at samsýna formanninum.
9. Ein avgerð sambært nr. 4 kann eftir arbeiðssteðgin leggjast fyri Fasta Gerðarættin.